ítróttur

Nr. 136 • hósdagur • 19. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Í blaðnum í morgin verður frásøgn frá Statoil Kring Føroyar súkklukappingini**

# Vestmannasangurin er framvegis á hillini



**Kapþróður: Í Vestmanna ikki bara tosa teir um, at tað ikki hevur hilnast so væl í ár. Afturvið kapp-róðrartosinum eru teir farnir undir at byggja eitt nýmótans neyst til bátarnar**

Tey árini, tá vestmannasangurin ongantíð hevur ljómað kring landið teir leygardagarnar, tá kapp-róður hevur verið á skránni, hava verið fá. Síðani 1983, tá teir fyrstu ferð vunnu FM, hevur Vestmenningurin verið meistari seks ferðir, og tey flestu av hinum árunum hevur 10–mannafarið úr Vestmanna vunnið onkran róðurin.

Í fyrraárið høvdu teir í Vestmanna eina nýggja Havfrúgv. Hon vann FM heitið í kappingini bæði hjá dreingjum og gentum. Og kappróðrarárið í fjør, tá 10–mannafarið vann FM, minnast teir í Vestmanna serliga fyri, at tað eydnaðist teimum at vinna vestanstevnu róðurin í heimasjógvi. Hetta var fyrsta ferðin síðani 1952, at Vestmenningur vann í Vestmanna.

Men higartil í ár hevur ikki hilnast væl. Vestmenna er framvegis tann sama stóra kappróðrarbygdin, sum hon altíð hevur verið. Umframt Vestmenningin og Havfrúnna við gentum og dreingjum, luttekur nýggja 6–mannafarið Fortuna eisini við kvinnum og monnum, men tað tykist ikki ganga nakran veg. Nú er bara ein av seks FM kappingum eftir, og vit mugu bara staðfesta, at enn hevur einki høvi verið hjá teimum í útvarpinum at spæla sangin um Vestmanna.

## Soltna úrtøkan og hugurin

Vestmenningurin hevur einki megnað at gjørt við Havnarbátin, og teir stríðast við Eysturoyingin um silvurplássið. Burtursæð frá óeydnisróðrinum hjá Vestmenninginum í Fuglafirði, tá teir endaðu á fjórða plássi, hava vestmenningar hvørja ferð vunnið kappingina um næstfremsta plássið, men tað er sjálvandi ikki nøktandi, tá tú á næstan á hvørjum ári hevur vunnið onkran róður.

Havfrúgvin við dreingjum fekk á vestanstevnuni í Sørvági síðsta leygardag frægasta úrslitið higatil í ár. Tað var eitt fjórða pláss. Á norðoyarstevnu vóru teir nummar fimm, og á Tvøroyri, í Fuglafirði og í Hvalvík vóru teir nummar seks. Hjá gentunum umborð á Havfrúnni hevur skorist illa. Á vestanstevnuni fingu tær eitt stig, og á sundalagsstevnuni fingu tær eitt. Tað er samlaða úrtøkan higartil.

Hjá Fortúnuni hevur tað ikki roynst væl – hvørki hjá monnunum ella kvinnunum. Kvinnurnar hava verið nummar sjey í fýra róðrum, og í Fuglafirði vóru tær nummar seks og fingu einasta stigið higartil. Menninir vóru nummar fimm í Fuglafirði og fingu tvey stig. Í hinum róðrunum hava teir verið nummar fimm eina ferð (tað var í Fuglafirði, at teir fingu tey bæði einastu stigini í ár). Tvær ferðir hava teir verið nummar sjey, í Hvalvík vóru teir nummar átta, og á vestanstevnuni í Sørvági endaðu teir á níggjunda plássinum.

– Áhugin fyri kappróðri er framvegis stórur í bygdini. Tá úrslitini ikki eru so góð, sum tey onkuntíð hava verið, so er tað nátúrligt, at áhugin at ferðast til stevnurnar ikki er so stórur hjá viðhaldsfólkunum, sum hann onkuntíð hevur verið, men á prátinum hoyrist, at fólk eru áhugað.

Hetta sigur Bárður Nielsen, sum er formaður í kappróðrardeildini hjá VÍF, og sum sjálvur hevur róð nógv og verið við til at vunnið nógvar róðrar – bæði við Havfrúnni og við Vestmenningi.

Hvat tosa vestmenningar um, tá bátarnir har norðuri ikki vinna?

– Teir venda og snara, hví tað higartil í ár hevur skorist verri, enn tað ofta hevur gjørt. Vit hava ikki altíð vunnið so nógv. Burtursæð frá í 1999, tá 5–mannafarið var spildurnýtt, hava tær manningarnar sjáldan staðið seg serliga væl.

Vestmenningurin hevur heldur ikki hótt Havnarbátin?

– 10–mannafarið plagar at roynast væl. Vit hava ikki mist mótið at vinna ólavsøkuróðurin, men higartil mugu vit bara staðfesta, at tað hevur ikki gingið eftir vild, sjálvt um báturin er væl mannaður, og sjálvt um vit halda, at stór orka er løgd í venjingina, sigur Bárður Nielsen.

Høvdu tit roknað við fleiri góðum úrslitum?

– Vit roknaðu við, at 10–mannafarið fór at standa seg væl, og so roknaðu vit eisini við, at 6–mannafarið Fortuna við monnum fór at standa seg væl. Manningin har umborð er fyri tað mesta teir dreingirnir, sum fyri tveimum árum síðani gjørdu Havfrúnna til sannførandi FM vinnara. Men tað hevur als ikki gingið, sum vit høvdu vónað, staðfestir Bárður Nielsen.

## Nýggja neystið

Men hóast fremstu plássini í teimum fyrstu fimm róðrunum ikki eru komin til Vestmanna, so arbeiða teir við ítøkiligum ætlanum um at betra umstøðurnar hjá kappróðrinum í traditiónsríku kappróðrarbygdini.

Í mong ár hava tey í Vestmanna tosað um grundina hjá Mariannu ella Mariannusa grund. Talan er um grund til turkihús, sum í tredivunum varð bygd Niðri á Mørk. Marianna Nielsen, sum rak skip og hevði annað reiðaravirksemi, átti grundina, men tað spurdist einki burturúr ætlanini um nýtt turkihús.

Nú hava vestmenningar gjørt av at byggja kapp-róðrarneyst á gomlu grundina. Ítøkiliga arbeiðið er byrjað, og tað verður roknað við, at kappróðrarbátarnir um ikki so langa tíð fara at standa væl har. Um teir fara at vinna er ein heilt annar spurningur:

– Vestmannasangurin verður vónandi at hoyra aftur heilt skjótt. Vit eru greið yvir, at nógv skal til, og at marginalirnir eru smáir. Vit halda framvegis, at vit hava møguleikar at vinna á ólavsøku. Tað hevði verið hugaligt, men tað verður torført, tí í flestu kappingunum hava vinnandi bátarnir verið sera sannførandi, staðfestir Bárður Nielsen.

Í fleiri feløgum senda teir kappróðrarbátarnar til Havnar at venja onkra ferðina upp undir ólavsøku. Hetta plaga vestmenningar ikki at gera. Teir hava nógvar royndir og vita akkurát, hvussu tað er at rógva frá Argjahøvda, framvið Molanum og inn ímóti Skipafelagnum.

Søgan um ólavsøkukapp-róðurin sigur, at teir í útvarpinum eiga at hava vestmannasangin á borðinum annan leygardag. Avrikini hjá vestmenningum higartil í ár boða ikki frá, at sangurin skal spælast ólavsøkuaftan, men í Vestmanna liva tey í vónini

**jh**



# Høvdingar hittast til víkingafund



*Arne Thorsteinsson við búrmerkinum hjá víkingafundinum, eini held úr føroyskum veðrahorni. Frá í dag og fram til mánadagin eftir ólavsøku fara vísindarfólk úr Norðurlondum, Stóra Bretlandi og Írlandi at skifta orð um søguliga vísind á fjúrtanda víkingafundinum, sum í ár verður hildin í Føroyum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Høvdingar innan víkingaraldarvísind hittast í Føroyum um dagarnar á víkingafundi at leggja fram og skifta orð um granskingarúrslit. Hetta er fjúrtandi fundurin í eini røð, sum byrjaði í Hetlandi í 1950**

VÍKINGAFUNDUR
*John Johannessen*

Frá í dag og fram til mánadagin eftir ólavsøku seta vísindafólk úr Norðurlondum, Stórabretlandi og Írlandi hvørjum øðrum stevnu í Havn.

Endamálið hjá teimum 85 gestunum og teimum 15 føroyingunum er at luttaka á fjúrtanda víkingafundinum, sum í ár verður hildin í Føroyum.

Víkingafundir eru tvørvísindaligir fundir, har fremstu víkingaaldargranskarar innan flest allar søguligar vísindagreinar hittast og leggja fram seinastu granskingarúrslitini, samstundis sum teir fáa høvi at kunna seg um víkingagranskanina í vertslandinum og skoða søguliga støð og fornminni.

## Aðru ferð í Føroyum

Hetta er ikki fyrstu ferð, at víkingafundur verður hildin í Føroyum. Tí í 1965, fimtan ár eftir fyrsta víkingafundin, varð fyrsti fundurin settur í Føroyum.

Sambært teimum, sum luttóku á tí fundinum, var hetta ein væl eydnaður og væl umtóktur fundur, bæði av føroysku og útlendsku luttakarunum. Og tað var eisini á hesum fundinum, at víkingafundurin fekk sítt skjaldramerki, sum Janus Kamban teknaði. Skjaldramerkið er ein føroysk held.

Orsøkin til, at heldin gjørdist skjaldramerkið hjá víkingafundinum kom av, at Bjarni Niclassen, fyrrverandi stjóri á Læraraskúlanum, gjørdi heldir til gestirnar til minnis um vitjanina í Føroyum. Hetta tiltak varð so mikið væl móttikið, at Janus Kamban teknaði eina held, sum beinan vegin bleiv til skjaldramerkið fyri allar víkingafundir.

Aftur í ár fara útlendsku gestirnir á víkingafundinum at fáa hvør sína held gjørda úr horni frá føroysku fyrireikarunum, sum minni um ferðina í Føroyum. Fyrireikingarnevndin hevur sett fólk í gongd við at gera heldir til tiltakið.

## Sjeyti fyrilestrar

Nógvir fyrilestrar eru á skránni fyri víkingafundin fram til ólavsøku. Teir eru nærum sjeyti í tali. Men kortini verður bert ein teirra almennur.

Høvuðsevnið fyri fyrilestrarnar er víkingaøld og eldra miðøld í Norðuratlantshavi og mentanarárin uttan eftir á samfeløgini í Norðuratlantshavi í nevnda tíðarskeiði og framman undan.

Almenni fyrilesturin hevur eitt meira dagsaktuelt evni. Fyrireikararnir hava valt at royna at geva spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya eina søguliga dimmensión við einum fyrilestri um støðuna hjá skattlondonum í norska ríkinum.

Skattlond eru londini í vestri, sum á sinni vórðu bygd úr Noreg, men ikki vórðu roknað sum partur av Noreg, men sum kortini í miðøld komu undir norsku krúnuna. Og tað verður Knut Helle, professari í Bergen, ið fer at seta spurningin: »Hvussu skulu vit fata støðuna hjá skattlondunum í norska ríkinum?«.

Fyrilestrarnir, sum verða hildnir á víkingafundinum, verða seinni givnir út í bók.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, er verji fyri víkingafundin, og Arne Thorsteinsson, Jóhan Hendrik Wither Poulsen, Símun V. Arge og Turið Sigurðardóttir standa fyri fyrireikingunum.

## Hendur og Hugflog í ítróttarhøllini



*Hendur og Hugflog verður aftur í ár í ítróttarhøllini á Hálsi vikuskiftið undan ólavsøku*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Søluframsýningin Hendur og Hugflog verður aftur í ár í ítróttarhøllini á Hálsi vikuskiftið undan ólavsøku**

FRAMSÝNING

Eins og undanfarin ár verður aftur í ár skipað fyri framsýningini Hendur og Hugflog, har fólk fara at sýna fram ymiskt heimavirki.

Framsýningin er vorðin ein traditión vikuskiftið undan ólavsøku. Hon verður relguliga hildin í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Framsýnignin byrjar í ár fríggjadagin 20. juli og er opin til sunnudagin 22. juli.

Latið verður upp fríggjadagin tann 20. juli klokkan 15, og sjálv stevnan verður sett klokkan 16.

Klokkan 18 verður harmonikutónleikur at hoyra, og klokkan 20 letur framsýningin aftur. Latið verður aftur øll kvøldini klokkan 20.

Leygardagin verður latið upp klokkan 14, og tá eru eisini ymsar aðrar, serliga framsýningar at síggja. Dansiframsýning er. Tvær móta- og vørusýningar, eins og føroyskur dansur eisini verður sýndur fram leygardagin.

Sama skráin er sunnudagin. Tó veðru býtt eitt sindur um upp á dansi- og mótasýningarnar.

Framsýningin Hendur og Hugflog letur aftur sunnukvøldið klokkan 20.00.

**ej**

**Stóra bringu ella lítla?**



**Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?**

**Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820

Lesið Sosialurin -tað loysir seg